oljufelt, sum áður eru funnin vestan fyri Hetland, hava ligið væl eystari og hava heldur ikki verið lønandi.

Harnæst er talan um jarðfrøðilig løg, sum eftir øllum at døma halda fram inn á føroyskt øki, tvs. at møguleikar eru fyri at finna somu jarðløg á føroyska landgrunninum, sum tey Foinaven og Schiehallion eru partur av.

Síðani er talan um at arbeiða á djúpum vatni við eini heilt nýggjari tøknifrøði. Hetta eru royndir, sum fara at koma sera væl við, tá farast skal undir oljuframleiðslu við Føroyar eisini. Tað er neyvan ov nógv sagt, at bæði leiting, útbygging og framleiðsla á føroyskum øki í stóran mun fer at verða ein endurtøka og ein spegilsmynd av tí, sum nú er í ferð við at henda skamt frá okkara marki.

Tað eru helst fáir føroyingar, ið veruliga geva sær fær um, hvussu nær føroyskum øki, ein veruliga upp. Talan er bert um nakrar fáar tímar við skipi úr næstu føroysku havn. Upp úr teimum báðum umrøddu oljukeldunum fer at koma ein árligur umsetningur, sum liggur langt omanfyri 10 milliardir krónur um árið. Leystliga roknað fer Schiehallionøkið einsamalt at hava ein umsetning uppá einar 8 milliardir krónur hvørt árt tey komandi 20 árini.

Hesi tølini og so tann sannroynd, hvussu nær oljukeldurnar liggja upp at føroyskum øki, áttu at givið okkum nakað at hugsa um.

**Hvussu við Conival og Suilven!**

Aftrat hesum báðum keldunum eru so eisini tvey onnur fund, sum vit enn vita lítið um. Talan er um Conival, sum liggur nakað syðri og sum verður mett at vera eitt stórt olju- og gassfund. Síðani er tað Suilven, sum liggur nakað norðari og so tætt Hvíta økinum, at bretar hava tikið tað óvanliga stigið at designera part av Hvíta økinum fyri at fáa fatur á øllum goymslunum í Suilven-fundinum og møguliga øðrum feltum nærhendis.

Tað eru teir, sum halda, at bæði Conival og Suilven ganga inn á tað Hvíta økið og møguliga eru partur av oljufeltum, sum ganga heilt inn á føroyskt øki eisini. Hildið hevur verið, at ein orsøk til, at bretar í heila tikið hava viljað hildið oljufund nærhendis føroyska markinum loynilig, er tann, at tess meira føroyingar vita um møguligar oljugoymslur um okkara leiðir, tess torførari verður hjá bretum at fáa eitt mark, sum gongur bretskum áhugamálum á móti.

Tá vit so fara at tosa um at gera semju við bretar, sum gongur út frá eini miðlinju, so er greitt, at ein semja, sum meira og minni gongur føroyingum á móti, ger, at vit koma at liggja fáar kilometrar frá stórum kendum oljukeldum. Ella sum onkur hevur tikið til: tá semja er gjørd við bretar, sum gevur okkum helvt ella stóran part av Hvíta økinum, tá eru vit vorðin oljuland. Kanska í so djarvt tikið til, men soleiðis sum umstøðurnar síggja út í stórum parti av grannalagnum – ikki so heilt av leið kortini.




*Risastóra framleiðsluskipið, sum skjótt verður okkara næsti granni. Tað skal taka ímóti allari oljuni frá Schiehallion-feltinum skamt frá føroyska fiskimarkinum. Tað verður bygt í Belfast og skal taka ímóti fyrstu oljuni í apríl.*



*Oljufelagið Amerada Hess er við í Schiehallionsfeltinum saman við m.a. BP, Shell, Statoil og Murphey Oil. Herfyri var føroyski umboðsmaðurin hjá Amerada á kunningarferð í Belfast og hugdi at skipinum*




*Føroyar eru umringaðar av olju- og gassfeltum. Conival liggur so tætt upp at markinum, at tað eru tey sum halda, at tað gongur tvørtur um miðlinjuna. Pílurin vísir nýggjasta feltið Suilven, sum oljuverðin setir stórar vónir til.*




*Ætlanir hjá Texaco, Total og Conoco er at fara undir gassframleiðslu á Atlantsmótinum og flyta gassið um rørleiðingar til lands. Enn er ætlanin á teknibordinum, so fleiri møguleikar verða kannaðir. Kelda Agenda*